

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 07 - 2012

# Oljuprísurin fer uppeftir

Tilburðurin mánadagin, tá eitt amerikanskt herskip skjeyt eftir einum indiskum fiskiskipi í Persaflógvanum, ávirkaði alt fyri eitt oljuprísin. Í gjár hækkaði Brent-oljan 62 cent, soleiðis at ein tunna kostaði 103,99 dollarar á marknaðinum í London. Í New York hækkaði ráoljuprísurin 11 cent og kom upp í 88,54 dollarar. Men oljuprísurin var hækkandi, áðrenn tað amerikanska herskipið lat skotini av í Persaflógvanum. Hóast tað kann tykjast sum ein andsøgn, so er tað minkandi vøkstur í Kina, sum togar prísin uppeftir, og sambært Thinu Saltvedt, greinara hjá Nordea, verður oljan dýrari enn. -Vit vænta, at tað fer at ganga betur við kinesiska búskapinum í seinna hálvári, tá stuðlandi tiltøk hjá myndugleikunum fara at virka, samstundis sum nýggjar íløgur verða settar í verk. Hetta fer at gera, at Kina, sum er heimsins næststørsta oljunýtsluland, fer at innflyta meiri olju, og tað økir eftirspurningin á marknaðinum, sigur Thina Saltvedt við fjølmiðlarnar.